## Fíggjarrættur á føroyskar hendur

Landsstýriskvinnan í innlendismálum, Annika Olsen, og danski løgmálaráðharrin, Brian Mikkelsen, hava avtalað, hvussu málsøkið Fíggjarrættur verður yvirtikið av føroyskum myndugleikum. Málsøkið Fíggjarrættur fevnir eitt nú um veð, avtalur, endurgjald, keyp og sølu, fyrning, brúkaravernd, rentur og skrivaðar og óskrivaðar rættarmeginreglur á hesum økjum. Somuleiðis er semja um, at samráðingarnar um málsøkið Sakførarastarvssemi og Revsurætt, kunnu enda í januar 2009. Tað fer ikki at kosta landinum nakað at fremja yvirtøkurnar av Fíggjarrættinum, Sakførarastarvssemi og Revsurættinum.



# Neyðstødd føroysk børn og

**Ráðgevingin hjá Barnabata, sum hjálpir fleiri hundrað børnum og ungum í svárari neyð, er í vanda fyri at verða niðurløgd, tí tey mangla 250.000 krónur**

BARNABATI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*



*- Tað kann verða ringt hjá børnum og ungum at fortelja fyri øðrum, at tey eru komin so langt út á eggina, at tey ganga í sjálvmorðstankum, ella meiðsla seg sjálvi, sigur Alice Simonsen, samskipari hjá Barnabata*

- Tað má bara ikki henda.

Alice Simonsen, samskipari hjá Barnabata torir ikki at hugsa tankan um, at tey nú kanska verða noydd at stongja "Tú og Eg" ráðgevingina, sum felagsskapurin hevur til børn og ung.

Ráðgevingin varð stovnað fyrst í 2007, og síðan hava tey hjálpt fleiri hundrað børnum og ungum at loysa svárar, sálarligar trupulleikar.

Í ár fekk Barnabati 150.000 krónur, men tað rakk ikki til og næsta ár hevur l landsstýrið sett 250.000 krónur av til felagsskapin.

- Vit eru takksom fyri, at játtanin hækkar, men hetta fer heldur ikki at røkka til, og tí er vandi fyri, at ráðgevingin fer at verða niðurløgd.

Alice Simonsen sigur, at skal tað eydnast Barnabata at varðveita virksemið óbroytt, fáa tey brúk fyri 573.000 krónum næsta ár, men so má løgtingið játta okkum 223.000 krónur afturat teimum 250.000 krónunum, landsstýrið ætlar, at vit skulu fáa.)

- Fáa vit ikki 573.000 krónur næsta ár, fer tað ikki at bera til at varðveita ráðgevingina á tí høga fakliga støði, hon er á í dag. Og tá vit ikki kunnu slaka fakliga støðið og hava minni ráðgevingartíð hvørja viku, er rættiliga óvist, hvussu virksemið skal halda áfram í 2009, leggur hon afturat.

Hon sigur, at higartil hevur Barnabati klárað at siglt ímillum skerini við stuðli frá privatum fyritøkum og einstaklingum, Men hetta er eitt ov ótrygt grundarlag at byggja víðari á, samstundis sum ein alt ov stórur partur av okkara arbeiðsorku fer til at savna pening inn, heldur enn til at hjálpa børnum, har arbeiðsorkan var nógv betri farin.

- Tað er neyðugt, at vit umsíðir fáa virksemið hjá ráðgevingina í eina fasta legu, staðfestir hon.

Hon vísir á, at ráðgevingin hjá Barnabata er einasta óhefta, dulnevnda ráðgeving til børn og ung í Føroyum.

Og hon leggur afturat, at tey á Barnabata vænta og vóna, at politikarar vísa børnum og ungum í Føroyum so mikið av virðing, at teir vilja tryggja, at ráðgevingin kann halda fram, so at tey í Barnabata, sum hava fakligan førleika at ráðgeva børnum og ungum í trupulleikum, fáa vissu fyri, at ráðgevingin ikki steðgar.

- Frammanundan eru ov fáa viðgerðartilboð til børn og ung við trupulleikum, og tí er eru vit fegin um, at so nógv føla, at hendan ráðgevingin er ein hjálp í teirra trupla gerandisdegi, sigur Alice Simonsen.

### Krevja høgt støði

Ráðgevingin hjá Barnabata er dulnevnd, og sostatt er ikki neyðugt hjá teimum, sum ringja við trupulleikum, at avdúka, hvørji tey eru.

- Ráðgevararnir eru øll fakfólk, ið hava við børn og ung at gera, sigur Alice Simonsen.

- Talan er um lærarar, læknar, sjúkrarøktarfrøðingar, pedagogar og onnur við barnafakligari útbúgving, og Barnabati ger eisini so nógv sum tilber at skipa fyri skeiðum og undirvísing, so at ráðgevararnir altíð hava dagførda vitan um børn og ung og dagførda vitan um at samskifta við børn og ung við trupulleikum og at ráðgeva teimum.

Hon sigur, at tað hevur avgerandi týdning, at ráðgevararnir duga at samskifta við tey ungu á einum máli, sum tey ungu skilja, og at ráðgevararnir eru dagførdir um teir trupulleikar, børn og ung hava at dragast við.

- Er fíggjarlig orka ikki er til útbúgving og skeið, er tað tørført at halda eitt nøktandi fakliga.

Alice Simonsen sigur, at Barnabati hevur sett tað krav til sín sjálvs, at ráðgevingin skal vera á einum høgum, fakligum støði.

# Nógv hugsa um sjálvmorð

**Hvønn einasta dag leggja ráðgevararnar hjá Barnabata oyrað til neyðarróp frá børnum og ungum, sum hava tað so ringt av kynsligari misnýtslu, einsemi, happing og hjartasorg, at tey hugsa um sjálvmorð**

BARNABATI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Børn og ung, sum hava roynt at taka lívið av sær, ella sum hava hugsað um sjálvmorð

Børn og ung, sum hava verið fyri kynsligari misnýtslu.

Børn og ung, sum hava tað ringt, at tey meiðsla seg sjálvi.

Hetta er dagligur kostur hjá ráðgevarunum, sum arbeiða í "Tú & Eg" ráðgevingini hjá Barnabata, sigur Alice Simonsen, samskipari hjá Barnabata.

Higartil í ár hava 523 børn og ung í svárari sálarligari neyð ringt til "Tú og Eg" ráðgevingina hjá Barnabata at leita sær hjálp.

Í alt fjør vóru tað 749 børn og ung, sum vendu sær til ráðgevingina.

### Nógv álvarsligari í ár

- Hóast tey, sum leita sær hjálp hjá ráðgevingini hjá Barnabata, ikki eru vaksin í tali í ár, aftur ímóti í fjør, er tað kortini ein týðiligur munur á 2007 og 2008, sigur samskiparin hjá Barnabata.

Og tann munurin er, at tey, sum hava ringt til ráðgevingina í ár, hava álvarsligari trupulleikar at dragast við, enn tey høvdu, sum ringdu í fjør.

- Í ár hava tað verið fleiri, sum hava leitað sær hjálp, tí tey hava tað so ringt, at tey hava hugsað um sjálvmorð, ella beinleiðis hava roynt at taka seg av døgum.

- Í ár eru tað munandi fleiri, sum hava verið fyri kynsligari misnýtslu enn tað vóru í fjør og tað sama ger seg galdandi fyri tey, sum hava so svárar sálarligar kvalir, at tey meiðsla seg sjálvi við at skera seg við knívi, glasbrotum og øðrum, hvøssum amboðum, brenna seg sjálvi, ella hava annan sjálvskaðandi atburð.

- Tey, sum ringja, hava eisini mangan fleiri ymsar trupulleikar at dragast við, og tí er talið á trupulleikum væl hægri enn talið á teimum, sum ringja.

Alice Simonsen sigur, at av tí, at talan er um so nógvar álvarsligar trupulleikar, og at trupulleikarnir eru meiri samansettir í ár, enn teir vóru í fjør, tekur hvør ráðgeving í ár eisini munandi longri tíð, enn hon gjørdi í fjør.

- Har talan er um álvarsligar trupulleikar, sum umfata kynsliga misnýtslu, sjálvmorðstankar og sjálvskaðandi atburð, brúkar hvør ráðgevari í miðal hálvan annan tíma upp á hvørt barn ella hvønn ungdóm, sum ringir.

### Kenna seg trygg

Samskiparin í Barnabata hevur onga eintýðuga forkláring upp á, hvussu tað ber til, at tey børn og ung, sum venda sær til ráðgevingina í ár, hava munandi svárari trupulleikar at stríðast við, enn tey høvdu í fjørð.

- Ein orsøk kann vera, at børnini og tey ungu eru vorðin tryggari við ráðgevingina enn tey hava verið og tí bróka hana meiri.

Alice Simonsen sigur, at ráðgevararnir, sum sita við kjattin og telefonina, gera eisini alt fyri at skapa álit ímillum seg og tann, sum ringir.

- Vit taka okkum ta tíðina, sum krevst, og vit eru nærverandi alla tíðina, samrøð-